Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52 a í Tingskipanini

Spyrjari: Steffan Klein Poulsen, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, landsstýrismaður í uttanríkis- og fiskivinnumálum

Evni: Føroysk neyðhjálp og menningarsamstarv

Spurningar:

1. Vil landsstýrismaðurin virka fyri at brúka føroyskar hjálparfelagsskapir og felagsskapir, sum føroyingar virka í, til at veita neyðhjálp og menningarsamstarv kring heimin?

Viðmerkingar:
Summi landsstýri hava raðfest at brúka føroyingar, tá ið neyðhjálp og menningarsamstarv skal veitast úr Føroyum, meðan onnur landsstýri hava raðfest at brúka stórar altjóða felagsskapir ella deildir hjá eitt nú ST og ES, sum føroyingar lítlan og ongan leiklut eiga í.

Við at brúka føroyskar hjálparfelagsskapir og felagsskapir, har nógvir føroyingar eru virknir í ella hava tætt tilknýti til, so er landsstýrið aktivt við til at menna "føroyska neyðhjálp" og at senda "føroyskar ambassadørar" kring allan heimin at umboða okkara tjóð.

Á Løgtingi, 17. juni 2026

Steffan Klein Poulsen